SOSIALURIN

Nr. 45 — 1. JULI 1964 — 37. ÁRG.

Í DAG

Javnaðarmál, ið eftir er at vinna

Helikoptari til innanoyggjafluttning

Í seinastu tingsetu setti javnaðarflokkurin fram uppskot um, at landskassin og staturin í felag keyptu ein helikoptara til sjúkra- og annan innanoyggjaflutning, tí slíkt flogfar kann lenda allastaðni og soleiðis koma fram til allar bygdir, um okkurt skuldi verið áfatt, ið krevur snarfluttning. — Ein helikoptari er dýrur at keypa og dýrur í rakstrinum; men í hesum føri hevur peningurin minni týdning, her ræður um eitt sambindingar- og hjálparamboð, sum kann veita snarhjálp bæði á sjógv og landi. — Serstakliga til sjúkraflutning er ein helikoptari nógv betri og hentari enn nakað annað flutningsfar. Hann ger tað skjótt, og tann, sum hevur verið á flog við einum slíkum loftfari, kann ásanna, at sjálvt í besta akfari eftir slættasta veg er tað munin betri og »behagiligari« at ferðast uppi í einum helikoptara.

SOSIALURIN Viðmerkingar

SKIPINI — OG MANNINGIN

Undanfarna landsstýri útvegaði skipini til landið — út við 60 í tali. Hitt stóra takið var at útvega hin neyðuga peningin; men tað eydnaðist seinasta landsstýri at loysa hetta mál til fulnar.

Fiskimenn og aðrir løgdu til brots, útvegaðu hin írestandi peningin, keyptu skipini og mannaðu tey.

Hitt fyrsta ódnartakið var tikið! Men treytin fyri at førini verða mannað er fyrst og fremst tann, at fiskimenn fáa slík kor, at teir støðast umborð; men longu nú gongur illa at manna skipini.

Takið hjá hesum landsstýrinum var at skapa arbeiðs- og lønarkor, ið fiskimenn vóru nøgdir við; men hetta hevur stýrið ikki gjørt.

Korini eru tvørtur ímóti vorðin verri:

Allir prísir rúka upp, pris- og solupolitikkur landsstýrisins skilaleysur, tollurin stórhækkaður fiskimonnum verður noktað 1200 kr. í minstuløn, noktað størri prisviðbót o.s.fr.

Brev til Sosialin

FYRISPURNINGUR

Dagliga lesa vit í »14.september«, hvussu vánalig viðurskifti fiskimanna eru, og at nakað má gerast.

Landsstýrið kann gera nakað, og »14.sept.« umboðar landsstýrið.

Hví hevur tað einki gjørt!

Blaðstjóri »14.septembers« er suðringur og kennir tí ivaleyst viðurskifti har. Eg fari tí at spyrja hann:

Hví hava tit einki gjørt fyri útróðramenn her í oynni — bara so mikið at vit fingu sama pris fyri fiskin sum aðrastaðni í Føroyum?

Ella er tað soleiðis, at »14..sept.« enn sum áður roknar okkum at vera eitt annað klassa fólk, tí vit eru — suðringar?

Suðringur.

Eygjað

TAÐ ER GUDS BARN, IÐ BATNAR

Fólk siga, at einki er hent undir »sjálvstýrislandsstýrinum«. Hetta er ikki rætt! Tað er als ikki so lítið hent — eitt nú við »14.september«.

Tað, ið eingin føroyingur hevði droymt um bara fyri sløkum tveim um árum síðan, er nú hent, sjálvt um fólk hava hug at smílast.

Av hinum »innispunnað tónum« kundu vit lesa henda stubba í »14. september« seinasta mikudag (haldið tykkum!!):

»Hann roynir bert at grumsa, at eitra við galli sínum. Men tað munnu fólk fara at skilja, at nú er nógmikið av hasum slagnum í føroyskum politikki. Persónligum briksli, gori og galli hava vit havt nógmikið av í føroyskum politikki.. Nú verða menn at læra at tosa í álvara um landsins viðurskifti...«

BARNAMATUR

SKIPANØVN. Í dag hava vit tikið 10 vanlig skipanøvn, sum ivaleyst øll kenna. Vit hava pettað nøvnini sundur, og nú skulu tit royna at seta tey rætt samanaftur:

NES — KER — TUN — RA
VES — BERG — POR — OY
TUR — PO — LÆK — NA —
KE — SKÁ — SUR — RIS —
VIÐ — FOS — GU — SUR —
RAS — VES — FOS — KAK
HA — LAR — TUR — VES —
LA — VÍK — TUR — FA —
TUR — LET — VÓN — RIÐ.

VERULEIKI

TAÐ ER VERULEIKI

AT undir hesum landsstýrinum hava vit fingið eina nýggja skattalóg — og meira skatt, eina nýggja tolllóg — og meira toll.

AT har skattalógin veitir lættar, verða hesir lættir tiknir aftur í meira tolli, eitt nú á sjóklæðum, tubbakki, bensini o.ø.

AT av hesum og mongum orsøkum aftrat er álitið á »sjálvstýrislandsstýrinum« støðugt minkandi.

Veitst tú

AT undir »sjálvstýrislandsstýrinum« er enn ikki farin fram ein einasta hending, ið veitir Føroyum meira sjálvstýri enn vunnið er av javnaðarmonnum, sambandsmonnum og sjálvstýrismonnum.

AT undir »sjálvstýrislandsstýrinum« hevur herútbúgvingin hildið fram á sama hátt sum undir seinasta landsstýri, og at enn er ikki ein hermaður farin av landinum.

AT »14..september« undan seinasta vali segði høvuðsmál tjóð veldisflokksins m.a. vera:
— HERVALDIÐ AV AFTUR LANDINUM.
— STEÐGIÐ HERÚTBÚGVINGINI.

AT fram til 8. nov. 1962 søgdu tjóðveldismenn, at teir vóru **»svorð og skjoldur fiskimannsins,«** og at teir í minsta lagi kravdu 1200 krónur í minstuløn til fiskimenn.

AT tá ið javnaðarmenn í 1964 settu fram uppskot um 1200 krónu minstuløn, greiddi EINGIN tjóðveldismaður atkvøðu fyri hesum uppskoti.

Skulu tit brúka bil

persónkoyring ella skúlakoyring, so ringið tlf. 2773.

Alexander Dalfoss

SØKKIÐ BISMARCK!

eftir C. S. FORESTER

umsett hevur MICHEL NIELSEN

(Framhald)

Lindemann og Lütjens stóðu boygdir yvir sjókortið umborð á Bismarck. »Nú kunnu vit jú venda heim,« segði Lindemann. »Teir kunnu ikki forða okkum.« — »Hví skuldu vit gera tað?« — »Vit hava vunnið ein veldigan sigur, og um týska útvarpið kundi boða frá, at vit vóru komnir heimaftur óskaddir, vildi allur heimurin ...« — »So vildi allur heimurin vita, at vit høvdu vunnið ein stóran sjósigur, men at vit ikki høvdu syrgt fyri at heysta fruktirnar av sigrinum. Í kriggi er ein noyddur av og á at seta okkurt uppá spæl, harra kommandørur. Tonk uppá allar møguleikarnir, sum liggja opnir fyri okkum úti í Atlantshavinum. Skulu vit venda og og lata teir fara til spillis? Minnist til, hvat eg gjørdi við Scharnhorst og Gneisenau. Tað er mikið gott við propagandu, men sjálvur dr. Goebbels má viðganga, at kriggi verða vunnin við gerðum, ikki við orðum ...« — Men bretar ...« — »Eg rokni ikki við at bretar kunna lyfta so mikið sum lítlafingur ímóti okkum í langar tíðir. Frammeftir! Vit sigla frá hasum bretska krússaranum, og so kunnu vit gera, hvat vit vilja. Tonk uppá allar konvoyirnar Lindemann.« — »Tað skal eg harra admiralur. Ja, hvat feilar, kommandørkapteynur?« Tann næsthægsti á skipinum var komin til og stóð rættur, meðan hann bíðaði eftir at sleppa at siga boð sín. »Ein einkult granat hevur rakt okkum, harra kommandørur. Tað er við dekk nr. 46 á bakbords síðu.« — »Hvat er tað,« spurdi admiralurin. »Har frammi, harra admiralur. Tað er beint yvir tanga nr. 2. Tangin er fullur, so eg siggi ikki, hvussu stórur skaðin er, men eg kann tó við vissu siga, at hann er ógvuliga lítil.« — »Og tað er allur skaðin, sum er hendur.« spurdi admiralurin. »Ja, harra admiralur. Um admiralurin hevði gjørt so væl at koma higar.« Teir hugdu yvir borð. »Sum admiralurin sær, er eitt sindur av olju á sjónum aftan fyri okkum. Vit eru við at pumpa tangan lens og yvir í ein annan tanga, harra admiralur.« — »So nýtist okkum ikki at hugsa um hatta meir?« spurdi Lütjens.. »Nei, harra admiralur,« segði kommandørkapteynurin. »Tó tað vil siga — sjógvur er komin í oljuna. Sostatt hava vit 200 tons minni olju, enn roknað.« — »So, so,« segði admiralurin. »Vit hava enn góða tíð til at venda við, harra admiralur,« segði Lindemann. »Tað veit eg væl,« segði admiralurin. »Takk kommandørkapteynur.« Lütjens og Lindemann stardu aftur at kortinum. »200 tons olju minni,« segði Lindemann. »Tað er ikki so gott, tá vit eru í sjónum, harra admiralur. Tá vit møta tangaskipunum, mugu vit noyðast við 200 tons minni, enn vit annars kundu havt.« »Ja,« segði Lütjens, meðan hann tonkti. Tað hann segði var meira til sín sjálvs, enn til Lindemann: »Ta avgerð, eg má taka — beint nú — kann broyta veraldarsøguna, kann koma at verða av týdningi hjá tjóðuni og kann verða av víttfevnandi týdningi fyri Týskland, nationalsosialismuna og førara okkara. 10.000 — 20.000 — 50.000 mannaliv fara boð mínt at hava týdning fyri.« — »Tað er satt, harra admiralur.« — »Fram — aftur. Avgerðin má takast nú. Seinni verður ikki møguleiki at broyta stoðu.« — »Eg havi sagt tygum mína stoðu, harra admiralur.« »Nei,« segði Lütjens knappliga. »Eg fari fram. Vit hava ikki bart okkum í Atlantshavið bert fyri at venda nøsina heim beinanvegin. Fram! Vit kunnu fara inn í Brest. Tveir dagar inni, so er skaðin umvældur og saman við Scharnhorst og Gneisenau kann eg sigla útaftur, og tað skal vera stríðsmegi aldri á ævini er sædd.« — »Javell, harra admiralur.« — »Og á vegnum møta vit kanska bretskum konvoyum. U-bátarnir kunnu føra okkum til tær. Fram.« — »Javell, harra admiralur. Kann eg fáa nærri ordrar?« — »Havið núverandi kós, til vit eru farnir frá hasum krússaranum. So kunnu vit seta kós móti Brest. Eg vænti ikki, at bretar rokna við, at tað er tað, vil vilja.« — »Javel, harra admiralur.«

VIII. SØKKIÐ BISMARCK!

Í operatiónsrúminum í admiralitetinum, stóðu nakrir yvirmenn, fremst admiralurin, kontraadmiralurin og flúgvarageneralinum, framman fyri kortinum. »Boð frá Suffolk, sir.« segði ein ungur yvirmaður og byrjaði at lesa upp hart. »Bismarck siglir framvegis við kós í ein útsynning og við 25 mila ferð, men hann missir olju; ein breiður streymur sæst í kjalarvatninum á honum.« — »So varð hann tó raktur,« segði kontraadmiralurin »Ja, men tó siglir hann 25 míl. Tað er væl bert ein lítil leki á einum tanga,« segði admiralurin. »Hvussu eru veðurtíðindini?« — »Lika so ring, sum higartil,« segði flúgvarageneralurin. »Skýhæddin 1000 fót, tættar mjørkaflókar, vindmegi 5 og ringur sjógvur.« — »So er stórur møguleiki fyri, at Suffolk missur hann burtur. Kunnu tit flúgvarar hjálpa okkum?« — »Vit skulu gera, hvat vit kunna, men hann er við at koma nakað burtur frá Íslandi.« Ein yvirmaður kom yvir til kortið fyri at broyta kósina hjá Home Fleet. »Har er Tovey nú,« segði admiralurin. »Um Bismarck heldur núverandi kós, møtast teir í morgin. Nær? — »Klokkan tólv á middegi í morgin,« svaraði ein ungur yvirmaður. »Um Bismarck also heldur kós. Øll skip, sum vit hava, mugu royna at fara ímóti honum. Har er t. d. Rodney. Latið hann fara frá sini konvoy og seta kós móti Bismarck. Ramillies — hann kann eisini fara frá konvoytænastuni. Telegraferið til Halifax og latið Revenge fara til havs, so skjótt sum gjørligt. Fáið eisini London og Edinburgh norðureftir. Og so er megi H. Hvussu er tað við Somerville?« »Hann er í sjónum, sir.« — »Gott lat meg siggja, hvussu hetta vil siggja út í morgin.» — »Ja, sir. Eg skal tekna tað upp alt fyri eitt.« Á einum øðrum borði lá eitt kort yvir Norðuratlantshavinum, og yvirmaðurin byrjaði at tekna strikur á tað. Eina tjúkka, reyða fyri Bismarck, svartar fyri Home Fleet, og megi H. tunnar strikur fyri Rodney, Ramillies og Revenge og punktaðar fyri krússararnar.. »Her er Bismarck og Suffolk í morgin á middegi, um kósin er óbroytt.« — »Ja, UM,« segði admiralurin. »Home Fleet, her,« helt yvirmaðurin fram. »Rodney. Megi H. Ramillies. Revenge. London og Edinburg.« Tann reyða strikan kom saman við ta svørtu, har Bismarck og Home Fleet fóru at møtast, og frá øllum síðum komu allar tær svørtu fram móti hesum staðnum, nakrar komu longri, aðrar styttri fram, og sum tær allar komu, sýntist tað eins og ein óyvirvinnulig kraft. »Tað sær gott nokk út uppá pappírinum,« segði admiralurin. »Sendið boðini alt fyri eitt!« — »Forsætisráðharrin er í telefonini, sir,« segði ein yvirmaður, sum skundisliga kom inn í rúmið. »Eg komi,« segði admiralurin. »Lat meg fáa hatta við mær..« Hann fór inn í rúmið hinumegin og ein yvirmaður tók kortið og legði tað á eitt borð, sum stóð tætt hjá telefon ini. Hann tók hornið: »Tann hægsti her.« — Røddin hjá forsætisráðharranum ljóðaði heldur hvøss, tá hann segði: »Tað er tygara uppgáva at søkkja Bismarck. Tað er av alstórum týdningi, og onki má forða fyri, at uppgávan verður loyst. »Javel, harra forsætisráðharri.« — »Hvussu við Ramillies? Rodney?« — »Boðini fara beint nú, harra forsætisráðharri« — »Revenge? Megi H?« — »Teir hava fingið boð.« — »Tygum syrgja fyri at gera alt, sum kann gerast fyri at søkkja Bismarck?« — »Javel harra forsætisráðharri.« — »Ikki bert alt, men eisini tað ómøguliga; ja, tygum mugu gera tað ómøguliga eisini — minnist til, at heimsins eygu hyggja eftir okkum nú.« — »Tað er ikki neyðugt at minna meg um tað, harra forsætisráðharri.« — »Gott. Minnist til, at Bismarck SKAL søkkjast! Farvæl.« Admiralurin var ikki komin hálvan vegin innaftur, tá hann motti tí unga yvirmanninum: »Snarboð frá Suffolk, sir. Bismarck er farin at skjóta eftir teimum!«

(Framhald)